

## Bjargaði Silkeborg

Tað líktist einum ósigri til Silkeborg á heimavølli ímóti AaB, til Christian Lamhauge Holst í yvirtíðini fór um koll og bjargaði liðnum brotssparkið, ið gav útjavnandi málið. Rajko Lekic var tryggur frá brotssparksblettinum, og so fekk Silkeborg við 1-1 úrslitinum eitt kærkomið stig, liðið er framvegis á bronsuplássinum. Eftir dystin hevur dúgliga verið kjakast um, um føroyski landsliðsspælarin filmaði seg til brotssparkið, og støðan var helst eisini av slíkum slagi, at ikki allir dómarar høvdu blást í floytuna.




**DROTNINGIN**

*Sára Traber Olsen vant burtur úr øllum dreingjunum, sum bjóðaðu henni av í unglingabólkinum*

*Mynd: Talvsambandið*

# Sára stinnast

**TALV** Sára Traber Olsen úr Havn vísti stórform í FM-kappingini hjá unglingunum, tá hon setti allar dreingirnar upp á pláss og streyk avstað við føroyameistaraheitinum

Hilmar Jan Hansen

Hóast fleiri evnaríkir unglingatelvarar lógu framvið, var eingin teirra líka stinnur sum 14 ára gamla Sára Traber Olsen úr Havn, ið helt tørn í oddastríðnum og setti allar upp á pláss. Fleiri royndu at standa henni kurl, men ongum eydnaðist, og tí endaði hon sum føroyameistari í unglingabólkinum.

Hetta er samstundis fyrstu ferð, at ein kvinnuligur telvari skrivar sítt navn í søguliga yvirlitið yvir FM-vinnarar hjá unglingum í 40 ár, og hetta eydnaðist henni framman fyri Rúna Tindskarð úr Havn og Heðin Gregersen úr Klaksvík, sum vunnu ávikavist silvur og bronsu.

Ikki minst er stórformurin hjá Sáru áhugaverdur, nú hon um eina góða viku skal umboða Føroyar í NM-kappingini í talvi fyri gentur, sum verður í Íslandi.

### Hinir vinnararnir

Umframt unglingabólkin og landsliðsbólkin, vóru tveir aðrir bólkar í kappingini á Giljanesi, 1. bólkur og almenni bólkurin.

Jónfinn Thomsen, sum er gøtumaður, men nú telvar fyri Sandavág, var ovastur í almenna bólkinum við hálvumsjeynda stigi, og serliga kappaðist hann við toftamannin, Andreas Andreassen, um fremsta plássið. Men Jónfinn royndist drúgvari og vann framman fyri Andreas, sum fekk silvur, og ein annan í Sandavágs Talvfelag, Jón Gregersen, sum fór við bronsuni.

Mest sannførandi sigurin av øllum vann Rógvi Olsen av Toftum í almenna bólkinum, har tað eydnaðist honum at vinna við átta av níggju møguligum stigum, sum er eitt sera gott avrik. Honum á baki komu Brandur Højgaard og Reinhold Isaksen við ávikavíst silvur og bronsu.

*einslistir@kallnet.fo*

## ÍTRÓTTARKLUMMAN

### »Gev okkum fleiri Giant-killers«

Hilmar Jan Hansen



# Favorittar vinna altíð

Í fleiri mánaðir hevur gingið sjón fyri søgn, at Neistin var stórfavorittur at vinna meistaraheitið í manshondbólti í ár, og páskaaftan eydnaðist tað so, tá Neistin eisini vann seinnu finaluna ímóti Kyndli. Í fleiri ár hevur verið væntandi, at Olaf Berg fór at roynast drúgvur í talvi, og páskaaftan tryggjaði hann sær føroyameistaraheitið í talvi fyri einstaklingar. Og neyvan kom tað heldur óvart á, at Kristian Sune Høgnesen triðja árið á rað vann føroyameistaraheitið í billard fyri einstaklingar.

men kortini ikki fekk staðið ímóti, tá favoritturin, Olaf Berg, veruliga setti gongd á endaspurtin. Men at Terji gjørdi kappingina spennandi, fer óivað at gera, at hann ikki so skjótt verður gloymdur, sjálvt um hann ikki vann.

Annað dømi sóu vit í landskappingini í fótbólti, sum fór í gongd skírisdag. Føroyameistararnir í HB høvdu vitjan av uppflytaraliðnum, FC Suðuroy, og meðan onkur fekk ilt í reyvina av, at onkur annar helt tað vera at senda apríl, at tíðindini bórust um, at suður-



**FAVORITT SIGUR**

*Neistin megnaði at liva upp til favorittheiti og vinna FM*

Sostatt fær niðurstøðan illa verið onnur, enn at favorittarnir vinna altíð. Og um ikki altíð, so vinna teir ofta. Skal heilt illa vilja til, vinna teir sum oftast. Men mong søgulig fordømi tala fyri, at hevur tú leiklutin sum favorittur, samstundis sum tú ert gjørdur úr rætta tilfarinum, ið tolir eitt sindur av hvørjum – ikki minst onkrum nosi av og á – vinnur tú.

Samstundis sum vit ferð eftir ferð síggja, at favorittarnir røkka málinum undan hinum, hendir tað títtur eisini viðhvørt, at onnur troðka seg inn ímillum og gera vart við seg, so tað ikki gongur, sum tey flestu høvdu væntað. Hjá summum eydnast tað og hjá øðrum ikki.

Tað sóu vit til dømis í talvkappingini, har Terji Petersen lá klárt á odda seint í kappingini, oyarliðið var á odda ímóti favorittinum, so kundu øll staðfesta, at tað altso ikki altíð er so, at favoritturin vinnur.

Einki er minni áhugavert í ítrótti, enn ein kapping, har tú næstan heldur teg kenna úrslitið frammanundan, so tí er kærkomið at síggja, at favorittarnir ikki altíð vinna. Tað koma vit óivað eisini at síggja fleiri ferðir aftrat, og tað skal tað vera, um áhugin skal vera har. Tí síggja vit fegin fram til fleiri »giant killers« í fótbóltinum, eins væl og aðrastaðni!

E.S. Moralurin í tekstinum omanfyri hevur einki at gera við eina ávísa spurnarkapping páskaaftan í einum ávísum kringvarpi, sum endaði við einum ávísum úrsliti ...